# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ólavur Andreas Olsen**, ættaður úr Fuglafirði, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnunáttina, 84 ára gamal.

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Maria Joensen**
Vestmanna,
ættað úr Vatnsoyrum

andaðist fríggjadagin 11. apríl á Landssjúkrahúsinum, 85 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum mikudagin 16. apríl kl. 18 í Vestmanna kirkju.
Jarðarferðin verður hósdagin 17. apríl kl. 14.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hanni, Martin, Fía og Marner**

Tey, ið vilja minnast Mariu, kunnu lata eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini.

†

Kunngjørt verður, at maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Ólavur Andreas Olsen**
ættaður úr Fuglafirði
búsitandi í Tórshavn

andaðist sunnunáttina 13. apríl 2008.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin 16. apríl kl.16 í Vesturkirkjuna.
Jarðarferðin verður hósdagin 17. apríl kl.13.

**Oda**
**Heri, Ove og Kári við familjum**

**Dagurin**
**16. apríl. Mariana.** Teir vita onga halga konu við hesum navni. Dagurin hevur eisini verið róptur magnusarmessa, til minnis um Magnus Erlendsson. Hann var jallur yvir helvtini av Orknoyggjunum, men systkinabarn hansara Hákun Pálsson, sum hevði hina helvtina, søkti at honum, og Magnus varð halshøgdur tann 16. apríl í 1115. Magnus varð seinni skírdur halgimenni, og dómkirkjan í Kirkjubø er vígd honum. Í halgilutaskápinum í múrinum eru bein av Magnusi.

# Konfirmantar í Havnar kirkju 1924



5. oktober 1924 vóru hesir konfirmantarnir konfirmeraðir í Havnar kirkju: Johannes Albert Hansen, Johan Carl Frederik Olsen, Elieser Meinhardt Sofus Mortensen, Niels Lassen Arge, Ole Elieser Hans Andreas Djurhuus „Dia á Vertshúsinum", Valdemar Poulsen, Niclas Carl Joen Niclasen (Koltur), Christian Dahl Restorff, Torleif Heine Restorff, Charles Bærent Bærentsen, Joen Eskild Michael Bernhard Christiansen, Jens Carl Engelbrecht Næs, Erland Johannes Bærentsen Fosaa, Johannes Johannesen, Sverri Dahl, Sofus Vinther Rubeksen, Gunnar Mortensen, Herluf Hansen, Hilmar Ragnar Rasmussen, (Koltur), Einar Ole Vang (Kaldbak), Johannes Wardum, Olaf Lindenskov, Sigurd Reinert (Kaldbak), Hans Johan Dam, Arne Sofus Ellingsgaard, Peter Hans Jacobsen, Joen Heine Elieser Jacobsen, Hergar Joensen (Hestur), Johan Olaf Petersen (Hvítanes), Ásmund Poulsen, Jens Pauli Wenningsted Rein, Ingvard Johannes Georg Jacobsen, Hans Poulsen, Danielle Sofie Jacobsen, Herdis Johanne Johannesen, Johanne Christine Weihe, Maria Waagstein, Ellen Elisabeth Christiansen, Pouline Marie Sofie Hansen, Helfred Poulsen (Velbastaður), Bergljot Patursson (Kirkjubø), Helene Elisabeth Johanne Pouline Olsen (Borðan), Jona Poulina Thomina Djurhuus „Birran", Anna Hansine Signhild Ellendersen, Jacobine Marie Sofie Joensen (Argir), Elsebeth Susanne Weihe, Anna Cathrine Sofie Jacobsen (Nólsoy), Turid Elisabeth Arge, Helga Hansy Henriette Nybo (Hestur) og Olivia Marie Frederikke Johansen.

Teir konfirmantarnir vit kenna eru hesir fýra dreingir aftast: 1. Niclas Carl Joen Niclasen, 2. Christian Dahl Restorff, 3. Joen Eskild Michael Bernhard Christiansen og 4. Elieser Meinhardt Sofus Mortensen.

Fimm dreingir næstaftast: 1. Niels Lassen Arge, 2. Johannes Johannesen, 3. ókendur, 4. Hilmar Ragnar Rasmussen (Koltur) og 5. ókendur.

Ein drong og fýra gentur triðaftast: 1. Sverri Dahl, 2. ókend, 3. ókend, 4. ókend og 5. Maria Waagstein.

Tveir dreingir og fýra gentur fjórðaftast: 1. Johannes Wardum, 2. ókendur, 3. ókend, 4. ókend, 5. ókend og 6. ókend.

Tveir dreingir og fýra gentur fimtaftast: 1. Hans Poulsen, 2. Charles Bærent Bærentsen, 3. Jona Poulina Thomina Djurhuus „Birran", 4. ókend, 5. ókend og 6. ókend.

Næstfremst ein drongur, tvær gentur og ein drongur: 1. ókend, 2. ókendur, 3. Erland Johannes Bærentsen Fosaa og 4. Poulina Marie Sofie Hansen.

Fremst f.v.: 1. Johannes Albert Hansen, 2. Arne Sofus Ellingsgaard, 3. ókendur, 4. Joen Heine Elieser Jacobsen „Heini í Kjøt", 5. Herluf Hansen, 6. ókendur, 7. Torleif Heine Restorff og 8. ókend.

33 dreingir vóru konfirmeraðir, og 23 eru á myndini. 17 gentur blivu konfirmeraðar og 15 eru á myndini.

Tey, sum kennast við teir persónar sum eru ókendir á myndini, eru vælkomin at ringja til Birgar Johannessen á tel. 314647 ella 214647.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við